# m fjørðin at halda ovastevnu



eisini verið úti í Nólsoy við asfalti og vegirnir, sum vóru farnir heldur illa av nógvu og tungu ferðsluni, nú havnalagið er útbygt, eru asfalteraðir av nýggj-um. Aðrastaðni í bygdini er eisini asfalterað. Meðan arbeiðið fór fram, sigldi Sam í "pendulfarti" um fjørðin við maskinum av ymiskum slagi – og innaftur so hvørt, sum uppgávurnar, ið maskinurnar høvdu, var lokið.

Tá ið seinastu bilarnir og maskinurnar fóru innaftur um fjørðin um kvøldið, var flóð, og tí var eitt sindur trupult at fáa akførini umborð aftur. Men tá ið saman um kom, gekst alt væl.

Mikudagin og hósdagin fingust menn við at seta stóra tjaldið upp úti við flakavirkið, har tann stóri dansurin verður. Skipað verður soleiðis fyri, at tað slepst úr tjaldinum og inn á flakavirkið, har fólk kunnu sita við borð og hugna sær, meðan dansurin er.

Tað minna tjaldið verður sett upp á heimaru bryggjuni, og har verður eisini matsøla og okkurt leskandi á stevnuni.



*Baldvin og Jónhard hava nógv at gera, nú flaggstengurnar skulu setast upp kring um í bygdini*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*



***Ternan fer at sigla um Nólsoyarfjørð, tá ið trýstið er størst. Ritan tekur 125 fólk, meðan Ternan tekur heili 319***

***Mynd: Vilmund Jacobsen***

## Stór uppgáva

Meðan menninir taka sær av teimum kropsliga tungu arbeiðunum, sum uppseting av tjøldum, flutningi av stabbum til flaggstengur og uppheingjan av peru-ketum í bygdini, taka konufólkini sær av teimum meira "bleytaru" uppgávunum við eitt nú mati og tí, sum nú einaferð skal verða í tjøldum, bingjum og innanveggja annars.

Øll hava nóg mikið at takast við, og tey munnu vera fá í góðum árum, sum ikki á ein ella annan hátt taka eina hond í onkustaðni.

Eftir stevnuna í fjør, skipaði stuðulsnevndin fyri svimjihyli í Nólsoy fyri hugnakvøldi fyri teimum mongu, sum høvdu verið við til at tikið eina hond í.

Tá metti Una Hansen, formaður í stuðulsnevndini, at eini 100 fólk á ymiskan hátt høvdu verið við til at gera stevnuna møguliga.

- Tey mongu, sum eru virkin á stevnuni, hava valla stundir at halda stevnu sjálvi, meðan stevnan er, og tí skipa vit fyri hesum kvøldi, segði hon.

Kring um í bygdini hevur eisini verið hampað um við máling og frýðkan annars, nú væntandi er, at hópur av stevnugestum fara at gera "innrás" í Nólsoy í vikuskiftinum.

Í vikuni hevur eisini ein maskina hjá Tórshavnar kommunu verið í Nólsoy og sópað dust og ókrút fram við vegum, gørðum og húsum.

## Stórar vónir

Ovastevnan hevur seinastu árini sett met á hvørjum ári, bæði við vitjandi og fíggjarligari úrtøku, og einki bendir á, at stevnan ikki eisini fer at seta met hesaferð.

Í Nólsoy vænta tey, at nógv fólk fer at koma út um fjørðin við Rituni og Ternuni, sum fara at sigla í pendul-farti alla stevnuna, og tey vænta eisini, at talið av bátum, sum í fjør var rættiliga stórt, ikki verður minni hesaferð, um veðurgudarnir fara at hátta sær so nøkulunda.

Ritan, sum tekur 125 ferðafólk í senn, fer at sigla út á seinnapartin leygardagin. Síðan fer Ternan, sum tekur 319 ferðafólk hvørja ferð, at sigla, meðan tørvurin er størstur.

Hetta verður soleiðis fyrstu ferð, at Ternan verður í regluligari sigling á ovastevnu, og tí vænta nólsoyingar, at hetta rættiliga fer at síggjast aftur í talinum av vitjandi.

Regatta-bátarnir, sum byrja sína ferð á Eiði fríggjadagin og fara at hugna sær í Hósvík fríggjakvøldið, stevna út til Nólsoyar leygardagin. Nú havnalagið er útbygt og er vorðið tryggari og betri, er einki til hindurs fyri at hýsa einum 100-200 bátum í góðum veðri eitt vikuskifti.

Umframt regatta-bátarnar, plaga nógvir aðrir bátar – bæði smáir og stórir - at seta stevnu út um fjørðin á ovastevnu. Umframt dansin í tjaldinum, sum verður bæði fríggjakvøldið og leygarkvøldið, verður eisini dansur í Bygdarhúsinum leygarkvøldið.

Á ovastevnu í fjør sigldi Ritan við út við 3.600 fólkum um Nólsoyarfjørð, og fleiri enn 800 fólk vóru í dansi í stóra tjaldinum – og tað er ótrúligt í eini bygd, har bert 270 fólk búgva.

Nólsoyingar bjóða øllum at verða hjartaliga vælkomin á ovastevnu 2005.

**Skráin fyri ovastevnu er prentað í Sosialinum í dag.**



*Minnissteinurin yvir Ova Joensen, sála. Her undir Mikkjalsveggi verður felagssangur leygarkvøldið*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*